Guds kærleiki og heilagleiki umbroytir okkum.

Tað er eisini ein tíð, har pílagrímar úr øllum heiminum fara til Róm og inn gjøgnum heilagu hurðina í Pæturskirkjuni.

Men hvussu er so hjá okkum?

Jú hoyr tað Hann sigur í Esaja 52,8-9: *Hoyr! Vaktarar tínir lyfta upp røddina, teir fegnast allir samlir; tí beint fyri eygum sínum síggja teir Harran koma aftur til Zion.*

9. *Skerið í fagnaðarsong allar samlar, tit toftir Jerusalems! Tí Harrin troystar fólk Sítt, Hann endurloysir Jerusalem.*

Eg kenni ein brand í mær, tá eg lesi hetta, tí av sonnum er tað Hann, Konganna Kongur, ið er komin aftur til Jerusalem, sum eg trúgvi, í hesum samanhanginum merkir samkomuna.

Hvat tráa vit eftir og hvat talar Harrin til tín og til mín?

Í nógvum førum, tá tað er nakað, ið Harrin ynskir eg skal gera, gevur Hann mær tankar, orð, dreymar og áhuga fyri ymiskum. Mangan hoyri eg fólk tosa og tosa um dreymar tey hava, men tað virkar í nógvum førum sum, at tað Harrin talar til tey, halda tey, at onkur annar skal gera.

Um tú brennur fyri einum ávísum, er tað helst tí, at Harrin ynskir, at tú skalt gera tað.

Eg hevði ein dreym fyri einari tíð síðan, har eg hugdi upp á eitt høgt fjall. Upp eftir fjallasíðuni gekk ein rúgva av fólki, og øll ætlaðu sær upp á toppin á fjallinum. Í fyrstani fylgdust øll upp eftir fjallasíðuni, men longur tey komu upp, dragnaði meir og meir ímillum tey. Nøkur gingu skjótt og onnur gingu spakuliga upp eftir, men tað, ið gjørdi at tey hildu fram, var tað tey væntaðu at uppliva, tá tey komu upp á toppin á fjallinum. Tá tey fyrstu komu upp á toppin, var gleði og gleimur, og tey heppaðu á hini um at halda fram og koma uppá at síggja tað tey sóu, og gjørdi hetta, at tey, ið vóru móð av vegnum upp, fingu nýggja kraft at halda fram.

Tað kann mangan tykjast, sum um mann gongur upp eftir einari brattari fjallasíðu, mann møðist á vegnum, men tað, ið er umráðandi er at halda á, tí líka so væl sum tey komu upp á toppin á fjallinum, koma vit eisini inn í tað, sum Harrin hevur til okkum.

Tað sum er umráðandi er, at vit síggja tað, ið Hann hevur lovað okkum, tí Hann gloymir ikki Síni lyftir.

At enda vil eg minna á hetta ørindi:

Hvussu yndisligir eru ikki á fjøllunum føtur hansara, ið kemur við gleðiboðum, sum boðar frið, sum ber góðan boðskap, sum kunnger frelsu, sum sigur við Zion: Gud tín er vorðin kongur!"

Av sonnum er Hann okkara Kongur og Harri. *ÁO*

Filadelfia

„Himmal á jørð"

Í samband við byrjanina av 2025 var bønarmøti, har vit fingu møguleika at siga hvat vit síggja fyri 2025, og komu nógv áhugaverd ting fram.

Eg sjálv kendi eina feginkenslu yvir tað, ið eg kenni, at Harrin kemur at gera í hesum árinum.

Men eitt, ið er umráðandi er, at fyri at tað skal ganga út, sum Harrin talar til mín, er neyðugt, at eg handli uppá tað. Um eg bara gangi og bíði, rokni eg ikki við, at tað sama hendir, sum um eg fari eftir tí, ið Harrin hevur givið lyfti um.

Tá eg lesi Esaja 52,6. *Tí skal fólk Mítt læra navn Mítt at kenna; tí skal tað tann dag læra at kenna, at Eg eri tann, ið sigur: „Hygg, her eri Eg!* brennir tað í mær, og eg hugsi, Hann sigur: Hygg her eri Eg, og eg hugsi, geva vit okkum far um, at tað er Konganna Kongur, ið sigur hetta við okkum? Tá eg hugsi víðari, er tað næsta: hvat vilja tit, at Eg skal gera fyri tykkum?

Vit hava tosað um fagnaðarár, men hvat merkir tað í veruleikanum? Fyri 2025 lýsir pávin árið 2025 at verða fagnaðarár, við evninum „Vónarinnar pílagrímar". Somuleiðis er tann heilaga hurðin í Peturskirkjuni í Rom latin upp, og vísir hetta á byrjanina á heilaga árinum 2025.

Eitt fagnaðarár er í katólsku kirkjuni ein serlig tíð, har mann strembar eftir fyrigeving og semju. Tað er ein tíð, har

MARS 2025

Leygardagur	1.		**Reingerð:** Merlie
Sunnudagur	2.	Kl. 11.00 Kl. 11.30	**Morgunmøti v. breyðbróting** **Barnamøti** Møtivertar: Nora, David, Óluva og Hans Ábyrgd/Leiðari: Sam Lovsongsleiðari: Tummas J., bólkur II Uppvørpa: Ása Elisabeth Ljóðbland: Tummas D. Tulkur: Høgni Talari: Ása O. Kaffivertar: Nora, David, Óluva og Hans
Mánadagur	3.	Kl. 20.00	**Bønarskúlin** Ábyrgd/leiðari: Mariann
Mikudagur	5.	Kl. 10.00	**Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna
Leygardagur	8.		**Reingerð:** Eyðbjørg
Sunnudagur	9.	Kl. 11.00 Kl. 11.30	**Morgunmøti v. breyðbróting** **Barnamøti** Møtivertar: Fríðbjørn, Anfinn og Gerd Ábyrgd/leiðari: Tummas J. Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur I Uppvørpa: Ragnar Ljóðbland: Sjúrður Tulkur: Ragnar Talari: Rúni Rasmussen Kaffivertar: Fríðbjørn, Anfinn og Gerd
Mánadagur	10.	Kl. 19.00	**Felagsbøn í Solo Deo Gloria**
Mikudagur	12.	Kl. 10.00 Kl. 18.30	**Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna **Barna- og ungdómsarbeiði** Ábyrgd: Nomi
Leygardagur	15.		**Reingerð:** Anna-May
Sunnudagur	16.	Kl. 11.00 Kl. 11.30	**Morgunmøti v. breyðbróting og inns. til húsið** **Barnamøti** Møtivertar: Eyðbjørg, Áshild og Kári Ábyrgd/leiðari: Ása O. Lovsongsleiðari: Tummas J., bólkur II Uppvørpa: Jóel Ljóðbland: Tummas D. Tulkur: Høgni Talari: Regin Kaffivertar: Eyðbjørg, Áshild og Kári
Mánadagur	17.	Kl. 20.00	**Bønarskúlin** Ábyrgd/leiðari: Anna
Mikudagur	19.	Kl. 10.00	**Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna
Leygardagur	22.		**Reingerð:** Nomi
Sunnudagur	23.	Kl. 11.00 Kl. 11.30	**Morgunmøti v. breyðbróting** **Barnamøti** Møtivertar: Hellen, Sjúrður, No-omi og Marner Ábyrgd/Leiðari: Anna Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur I Uppvørpa: Ragnar Ljóðbland: Sjúrður Tulkur: Ragnar Talari: Anna-May Kaffivertar: Hellen, Sjúrður, No-omi og Marner
Mánadagur	24.	Kl. 20.00	**Bønarskúlin** Ábyrgd/leiðari: Regin
Mikudagur	26.	Kl. 10.00 Kl. 18.30	**Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna **Barna- og ungdómsarbeiði** Ábyrgd: Nomi
Leygardagur	29.		**Reingerð:** Karin
Sunnudagur	30.	Kl. 11.00	**Familjumøti** Møtivertar: Nora, David, Óluva og Hans Ábyrgd/Leiðari: Lovsongsleiðari: Bólkur II Uppvørpa: Ása Elisabeth Ljóðbland: Tummas D. Tulkur: Høgni Talari: Kaffivertar: Nora, David, Óluva og Hans
Mánadagur	31.	Kl. 20.00	**Lovprísan og forbøn** Ábyrgd/leiðari: Hildibrandur

Fyrivarni verður tikið fyri, at broytingar kunnu koma í skránna.

STUÐLA ARBEIÐINUM HJÁ FILADELFIA

Um tú ynskir at stuðla arbeiðinum hjá Filadelfia, kanst tú flyta pening á konto í Betri nr. 9181 495 353 5

Tú ert vælkomin at viðmerkja á flytingina um tað er tíggjund, gáva ella annað. Takk fyri!

Samkomuleiðslubólkurin